# Herðaklapp til Adelborg

**The grand old Lady í sjónleikaheiminum í Klaksvík, Adelborg Linklett, fekk á grækarismessu ársins herðaklapp fyri sítt stóra arbeiði sjónleikinum í Klaksvík og landinum sum heild at frama**

HERÐAKLAPP
*Edvard Joensen*

Adelborg Linklett í Klaksvík fekk í ár ársins herðaklapp frá Leikpalli Føroya. Við herðaklappinum fylgdu eitt skreytblað, ein eftirgjørdur gekkaskortur og ein kekkur áljóðandi 12.000,- krónur.

Umstøðurnar í Hans Andriasarhúsi Undir Pisuvarða vóru eitt lítið sindur sindur lítillætnari, enn tað, vit nýliga hava sæð úr Hollywood. Her vóru eingi sjónvarpstól, sum mólu um tey, ið møttu upp, og avmyndaðu upp og niður, mettu um, hvør hevði vakrasta ella sjáldsamasta kjólan, ella hvør nú fylgdist við hvørjum ella hevði fríggjað uttangarðs seinasta hálvárið ella so.

Í Hans Andriasarhúsi var friðaligt og hugnaligt. Her vóru fólk komin saman at heiðra ein, tey ikki ivaðust í hevði heiðurin uppibornan.



*Adelborg Linklett fekk ársins herðaklapp frá Leikpalli Føroya. Laura Joensen handaði heiðursgávur í samband við útnevningina*

*Mynd: Maria Olsen*

## Semja um avgerðina

Men tað var ikki minni hátíðarligt enn í Amerika, hóast ikki so uppblást. Og tá úrslitið so varð kunngjørt - sum fleiri longu høvdu gitt frammanundan - vóru øll nøgd við avgerðina, sum tikin var.

Laura Joensen, formaður fyri Leikpall Føroya, beyð vælkomin og segði, at hon hevði vónað at sleppa undan at standa her aftur í ár sum umboð fyri Leikpall Føroya, tí vónir vóru til, at hon hesaferð skuldi umboða Tjóðpall Føroya.

Men so varð ikki, og tí stóð hon so her eins og Luther gamli á sinni og kundi ikki annað

Men tað gjørdi ikki góða lagið verri, og tá úrslitið var kent, vóru øll á einum máli um, at hetta var eitt gott val, útnevningarnevndin hevði gjørt.

Ein rørd Adelborg Linklett takkaði fyri heiðurin og helt, at tað kundi líka væl verið onkur annar enn hon, sum átti hetta uppiborið.

Eisini ein annar vetreranur frá sjónleikalívinum í Klaksvík, Jógvan Ósá, tók orðið á samkomuni. Hann fegnaðist Adelborg´sa vegna um heiðurin, sum hann av fullum huga tók undir við og metti verða fult uppibornan.



## Grundgevingin

Í grundgevingini hjá útnevningarbólkinum, verður dentur lagdur á tað stóra arbeiðið, Adelborg Linklett hevur gjørt í og fyri Klaksvíkar Sjónleikarfelag.

Men hon hevur eisini verið virkin aðrastaðni enn í Klaksvík, tá talan er um bæði sjónleik og film.

Hon hevur millum annað fleiri feðrir verið boðsend at koma til Havnar at spæla við í sjónleiki, eins og hon hevur verið við í tveimum filmum. Í filminum »Maðurin ið slapp at fara« hevði hon ein týðandi leiklut, eins og hon eisini var við í »Bye Bye Blue Bird«.

Í grundgevingini verður eisini tikið við, at Adelborg Linklett hevur verið »primus motor« í Klaksvíkar Sjónleikarfelag, síðan tað varð endurstovnað í 1977. Í 20 ár hevur hon verið formaður, og hini árini hevur hon verið nevndarlimur.

Hon hevur oftast tikið ein leiklut á seg, tá leikir skulu setat upp í Klaksvík, vísir útnevningarbólkurin á. Og alt hitt arbeiðið, sum er í samband við sjðonleikin, átekur hon sær eisini, tá tað skal vera.

Har skulu seymast búnar. Har skal gerast pallur. Finnast skulu bæði leikarar og leikstjórar.

– Og fast hevur verið, at leikstjórarnir sum koma utaneftir, tað verið seg føroyingar ella útlendingar, búgva hjá Adelborg, greiða starvsfelagar hennara frá.

At Adelborg hevur týdning fyri felagið, bera vitnisburðurin frá starvsfeløgunum boð um. Ein teirra sigur soleiðis um Adelborg:

»Adelborg hevur havt stóran týdning fyri tey ungu, tí hon dugir so væl at fáa tey at kenna seg væl. Hon er tann persónur í Klaksvíkar Sjónleikarfelag, sum hevur eggjað ungfólki at taka lut í listarliga virkseminum við at stimbra og menna ungdómar at gerast dugnaligir sjónleikarar.«

Eingin uppgáva hevur verið ov stór, og eingin ov lítil fyri Adelborg Linklett. Hon hevur leikt, leikstjórnað og ikki minst staðið fyri tí prakiska. Um tað er at flyta pallmundir, gera reint og ikki minst gera mat til hesi fólkini, so er hon har.

Útnevningarnevndin endar grundgeving sína soleiðis: »Hon er ein góð fyrimynd fyri onnur áhugafeløg uttan fyri meginøkið.«



# Tjaldur ver vælkomið

**Nógvur vindur og sera kalt var, tá Grækarismessuhald var hildið í Klaksvík sunnudagin. Av tí sama var heldur ikki so nógv fólk komið saman**

GRÆKARISMESSA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa flutti fram røðu til Grækarismessuhaldið í Klaksvík*

**Klaksvík:** Skrúðgongan við hornorkestrinum og skótunum fór frá býráðshúsinum beint við ferjuleguna heim í skúlan við Ósánna. Skrúðgongan var av teimum smáu í ár, tað má sigast. Hví so var, skal her vera ósagt, men tað var løgið at síggja eina so lítla skrúðgongu. Fólk gjørdu tó, sum tey plaga. Tey stóðu og bíðaðu í støðum eftir henni og fylgdu so við, so hvørt, sum hon kom framvið.

Hóast tað var sera kalt og nógvur vindur, varð tiltakið úti í sjálvum skúlagarðinum. Hornorkestrið spældi eitt lag, og síðani kom Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa upp á talarastólin.

## Svart og hvítt

Í røðu síni tosaði Eyðfinn Reyðberg nógv um litirnar, sum eyðkenna tjóðfugl okkara. Tann svarti og hvíti liturin. Hann samanbar hesir litir við, hvussu tað verður hugsað í samfelagnum í dag. Hann kom inn á hetta, at tað so ofta verður hugsað meira um tað svarta heldur enn tað hvíta. Og tað harmaðist hann um.

– Í mínari verð er tað av stórum týdningi, at vit ikki blanda hvíta og svarta litin saman. Tí hvat hendir um vit gera hetta - svart og svart er og verður altíð svart, tað fær ikki verið annað. Men blanda vit hvítt og svart, ja so verður tað eisini svart - tað fær heldur ikki verið annað, og tað er júst hetta, sum dagsins samfelag roynir at gera í dag, við at siga okkum, at einki bert er hvítt og svart, segði Eyðfinn Reyðberg millum annað.

Hann segði eisini, at menniskju kunnu bert hava eitt gott lív og byggja land, og harvið skapa trivnað og framburð, við at varðveita ljósið ljóst, og hugsa seg væl um, hvat tey velja at bera fram í ljósið.

Tá røðan frá Eyðfinni var liðug, spældið hornorkestrið aftur tvey løg og so ein marsj.

Hóast skrúgongan var minni enn vanligt og færri fólk vóru komin at lýða á, so má tað sigast at vera hugaligtkortini at síggja, at hóast kuldi og vindur, onnur tiltøk ella áhugamál, so eru tað nøkur, sum enn halda fast við hendan gamlan siðin at bjóða tjóðarfugli okkara vælkomnum aftur til landið.

# Framsýning í Norðoya Kunningarstovu

Maria Mørkøre hevur í hesum døgum málningaframsýning í Norðoya Kunningarstovu. Talan er um 19 listaverk – bæði oljumálningar og myndir gjørdar úr koli og vatni.

Maria er klaksvíkingur, hon er 36 ára gomul og lærdi málningalist á Listaskúla í Danmark frá 1996 til 1998.

Hon hevur millum annað eisini havt framsýningar á Viðareiði, í Tórshavn, Klaksvík og í Danmark. Eisini hevur hon luttikið á framsýningum á norðoyastevnu, Ólavsøku og einar á Stykkinum.

Umframt at vera listakvinna, undir Maria í tekning og málningalist á Føroya Handarbeiðskúla.

Íblásturin til listaverkini sigur hon seg fáa frá føroyskum bygdaløgum, náttúruni og menniskjum.

Framsýningin hjá Mariu verður hangandi uppi allan mars mánað.



*Maria Mørkøre*

## Herverk á bilar

Løgreglan í høvuðsstaðnum sigur frá einari røð av herverkum, sum vórðu framd á bilar leygarnáttina. Tað letur til, at gerningsmaðurin ella menninir eru farnir eina rundferð í Djóna í Geilsgøtu og Jóna Broncksgøtu, har teir millum annað hava skorið dekk upp á einum sjey ella átta bilum og skøvað teir við onkrum amboði.

Eitt annað herverk var á ein bil sunnudagin. Hetta var oman Mattalág, og heldur løgreglan ikki, at tað er samband ímillum hesi herverk.

Eigarin á bilinum sá teir, sum framdu herverkið. Talan var um fýra dreingir, sum nýttu eitt skrellistativ til at knúsa bilin við.

Løgreglan kannar nú herverkini, men sum er hevur hon onki ítøkiligt á teimum fyrru herverkunum.

**-sae-**

## Ferðsluóhapp

Fríggjadagin hendi eitt ferðsluóhapp á Landavegnum í Havn. Ein knallertførari helt ikki treytaleysu víkiskylduna, og rendi tískil saman við ein bil. Knallertførarin fekk nakað av skaða og varð fluttur á Landssjúkrahúsið.

Seinni fríggjadagin var eisini eitt ferðsluóhapp í Berjabrekku. Bilførarin var sjónliga ávirkaður og verður nú skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Somuleiðis varð ein annar bilførari tikin fyri rúsdrekkakoyring við Klubbagarðin leygarmorgunin.

**-sae-**

## Fólk í viðførisrúminum

Løgreglan tók ein bil leygarnáttina, sum koyrdi runt í býnum við viðførislúkuni opnari og fólkum sitandi í viðførisrúminum. Bilførarin verður nú skuldsettur fyri brot á ferðslulógina.

Ein bilførari varð steðgaður fyri ov nógva ferð á vegastrekkinum við Áir seinnapartin sunnudagin. Ferðin máldi 141 km/t og fer málið í rættin, har avgerðin um, viðkomandi bilførari skal missa koyrikortið ella ikki, verður tikin.

**-sae-**

## Royndi at stjala bil

Onkur hevði gjørt sær serliga stóran ómak við at royna at stjala ein bil úr einari garasju leygarkvøldið.

Løgreglan sigur, at viðkomandi hevur roynt fleiri ymiskar snildir fyri at sleppa avstað við bilinum.

– Milluma annað varð instrumentbrettið skrúvað frá, so her er talan um kvalifiseraða roynd at stjala ein bil, men viðkomandi slapp so ikki avstað við honum, sigur vakthavandi.

**-sae-**

## Gjørt seg inn á standmynd



*Mynd: S. á Høvdanum*

Tá fólk, sum búgva á Biskopstø ella har á leið í Klaksvík, vaknaðu sunnumorgunin, sóu tey eina heldur løgna sjón uttan fyri Norðoya Heimavirkið og Klaksvíkar Bókasavn. Standmyndin av Kjølbro stendur har, og hevði hon fingið ein innkeypsvogn upp á heysin.

Hvør hevur gjørt hetta ella júst nær hetta er hent, er ilt at meta um.

Løgreglan í Klaksvík hevur ikki fingið nakrar fráboðan um hetta.

Annars sigur vakthavandi í Klaksvík, at vikuskiftið hevur sum heild verið sera friðarligt.

**-sae-**